J.nr.: L.G. 2008/205-0341

Til Løgtingsgrannskoðararnar:
Heini O. Heinesen,
Magni Laksáfoss,
Anfinn Kallsberg og
Mikkjal Sørensen

# Upprit um Forskotsgrunn Fiskiflotans

2. apríl 2009 var móttøka á Fiskirannsóknarstovuni í sambandi við at stovnurin fylti 50 ár. Sama dag avdúkaði landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum nýggjan samleika hjá stovninum, sum nú ber heitið Havstovan.

Í sambandi við hátíðarhaldið kom fram, at stovnurin hevði fingið gávu frá Forskotsgrunni Fiskiflotans. Tíðindini fingu Landsgrannskoðaran at undrast, tí talan er um ein almennan grunn. Landsgrannskoðanin hevur gjørt eina stutta frágreiðing um málið.

## Fjølmiðlaumtala

2. apríl 2009 bar sjónvarpið hjá Kringvarpi Føroya tey tíðindi, at Havstovan hevði fingið eina gávu á 10 mió.kr. frá Forskotsgrunni Fiskimanna, at nýta til nýtt havrannsóknarskip. Formaðurin Jákup Sólstein lovaði stjóranum á Havstovuni gávuna, tá nýtt havrannsóknarskip verður bygt. Upplýst varð, at peningurin er tøkur í føroysku peningastovnunum, um skipið verður bygt.

4. apríl 2009 skrivar tíðindablaðið Sosialurin, at fyrrverandi formaðurin í reiðarafelagnum, Jákup Sólstein, handaði Havstovuni eina tilsøgn um 10 mió.kr. til bygging av nýggjum havrannsóknarskipi, og at tilsøgnin er stílað til Fiskirannsóknarstovuna við stjóranum, Hjalta í Jákupsstovu. Sosialurin skrivar, at tilsøgnin er treytað av, at Føroya Løgting broytir verandi løgtingslóg um Forskotsgrunn Fiskiflotans.

Málið er eisini umrøtt í Dimmalætting 3. apríl, har sagt verður, at talan er um "stórfingna gávu frá Føroya Reiðarafelag" (hetta er uttan iva misskilt av tíðindafólkinum hjá blaðnum).

## Um Forskotsgrunnin

Grunnurin er stovnaður við Ll. nr. 71/1997 um Forskotsgrunn Fiskiflotans. Sambært § 1 er endamálið við grunninum at veita forskot til fiskimenn við bústaði í Føroyum, og sum eru mynstraðir við fiskiskipi, skrásett í Føroyum. Stovnsfæ grunsins 18 mió.kr. kom úr landskassanum, partvíst sum eykajáttan og partvíst við yvirøku av útistandandi forskotspeningi hjá Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna.

Fyri grunninum situr ein nevnd við 3 limum. Føroya Fiskimannafelag velur 1, Føroya Skipara- og Navigatørfelag/Føroya Maskinmeistarafelag/Føroya Motorpassarafelag velja ein lim og Føroya Reiðarafelag velur 1. Núverandi formaður er Jákup Sólstein. Lønjavningarstovan fyrisitur dagliga virksemi grunnsins sambært § 4.

Roknskapurin hjá grunninum, sum verður grannskoðaður av grannskoðaravirkinum SPEKT, verður lagdur fyri løgtingið til góðkenningar í fylgiskjalið til landsroknskapin. Roknskapurin verður ikki tikin við í fíggjarstøðuna í landsroknskapinum, men verður lagdur við sum fylgiskjal aftast í landsroknskapinum, saman við 7 øðrum grunnum.

## Notat frá Fiskimálaráðnum

Landsgrannskoðanin hevur vent sær til Fiskimálaráðið um málið. Fiskimálaráðið hevur gjørt eitt innanhýsis notat dagfest 19. mars 2009, eftir at Jacob Vestergaard, landsstýrismaður hevði fingið áheitan frá nevndini fyri grunnin um at taka stig til at broyta endamálsgreinina fyri grunnin soleiðis, at nevndin fær møguleika at nýta pening úr grunninum til bygging av nýggjum havrannsóknarskipi.

Nevndin skjýtur í skrivinum til landsstýrismannin upp, at brúka 10 mió. kr. av teimum 29 mió. kr., sum var eginognin hjá grunninum 31/12 2008, til endamál, sum nevndin heldur bæði kemur fiskivinnuni og landinum til gagns. Grundgevingin er, at tørvurin á hýruforskoti er minkaður nógv tí at rækjuflotin er minkaður so nógv, og at tað tí stórtsæð bert eru flakatrolararnir og nøkur fá rækjuskip, sum fáa forskot. Nevndin fyri Forskotsgrunn Fiskiflotans leggur uppskot til broyting av § 1 í lógini fyri grunnin við brævinum.

19. mars 2009 hevur Fiskimálaráðið gjørt eitt upprit til málið, har sagt verður, at tað ikki verður mett sum nøkur hóttan móti virkseminum hjá grunningum, um 10 mió. kr. verða tiknar úr honum. Ráðið metir tó ikki, at tað er rætt, at grunnurin sjálvur fær heimild til at avgera um og nær partur av eginogn grunnsins kann nýtast til nýtt fiskirannsóknarskip.

Fiskimálaráðið grundgevur niðurstøðuna við, at vísa til § 43, stk. 2 í Stýriskipanarlógini, um at ongin útreiðsla má verða goldin, uttan heimild í galdandi fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg, og at fíggjarlóg ella onnur játtanarlóg er eitt týðandi amboð hjá løgtinginum at stýra, ávirka og raðfesta útreiðslur og inntøkur landsins.

Fiskimálaráðið mælir ístaðin til, at leggja uppskot fyri Løgtingið um at lækka kapitalin í grunninum, og at peningurin síðani umvegis fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg verður nýttur til nýtt havrannsóknarskip. Eisini mælir ráðið til, at eitt møguligt uppskot um at lækka kapitalin ikki verður lagt fyri Løgtingið fyrr enn peningurin ítøkiliga kann játtast til fiskirannsóknarskip.

## Viðmerkingar hjá Landsgrannskoðanini

Landsgrannskoðanin hevur í frágreiðingum seinastu árini víst á fleiri viðurskifti viðvíkjandi grunnum, herímillum eisini Forskotsgrunninum. Í frágreiðingini um "Ávísar stovnar og grunnar og tilknýti teirra til fíggjarlóg og landsroknskap" frá oktober 2007, royndi Landsgrannskoðanin enn einaferð at varpa ljós á ymsar ivaspurningar á økinum.

Forskotsgrunnur Fiskiflotans er landsgrunnur og ogn landskassans. Um grunnurin skal takast av, skal uppskot um avtøku av grunninum leggjast fyri løgtingið, og sambært § 7, stk. 2 skal løgtingið taka støðu til, hvussu skal verða við ognum grunsins. Løgtingið kann eisini við lóg broyta virksemi grunsins.

Landsgrannskoðanin heldur ikki at nevndin í Forskotsgrunninum sjálv kann gera av um ella nær partur av eginognini kann nýtast til nýtt fiskirannsóknarskip.

Argir, 27. apríl 2009
Beinta Dam